**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Standard hydrografi. Túrur nr. 2002**
**Tíðarskeið 10/2-19/2-2020**

**Fólk frá Havstovuni:** Poul Vestergaard og Regin Kristiansen.

**Ábyrgd:** Karin Margretha H. Larsen

**Endamál:** Endamálið við túrinum er at fylgja við broytingunum í havinum kring Føroyar. Túrurin er ein partur av teimum regluligu kanningunum eftir standardskurðunum. Eisini skuldu vit gera eitt hál í Bankarennuni við MIK-glúpinum eftir reyðæti.

**Reiðskapur:** Seabird-CTD við rosettu, WP2-glúpur, MIK-glúpur, útgerð at lesa data úr hitamátarum á botni.

**Um túrin:** Vit fóru út týsdagin 11/2 kl. 2000. Siglt varð norður á støð N14, har vit byrjaðu at taka standardskurð N. Tað gekk væl at taka fyrstu støð, vit fóru niður 2000 m dýpi. Á næstu støð fingu vit trupulleikar við CTD-ini. Eftir at vit høvdu arbeitt upp á brekið í nakrar tímar, uttan at brekið varð rættað, var avgjørt at sigla til lands, fyri at fáa hjálp. Eftir at hava siglt í nakrar tímar, varð brekið tó rættað, við góðari hjálp og vegleiðing frá fólki á landi. Vit sigldu so inn á støð N1 á skurði N, og tóku støðir norðureftir. Tá vit høvdu tikið støð N9, var veðrið so vánaligt, at avgjørt var at gevast og sigla móti landi.

Vit komu inn undir land 14/2 kl. 22 og lógu bakk har til um morgunin 16/2. Tá sigldu vit vesturum og tóku skurð R vestur úr Mykinesi. Haðani varð siglt suður undir Sandoynna har vit tóku skurð V frá landi og út á Føroyabanka. So var bert skurður K eftir vestanfyri og hesin skurður varð tikin inneftir. Av tí at veðrið var vánaligt á túrinum, var ikki tíð til at taka skurð E og skurð S eystanfyri og líkindir vóru heldur ikki, at taka MIK-hálið í Bankarennuni.

Liðugt var at taka støðir týskvøldið 18/2 kl.17. Tá varð siglt á Havnina, har vit vóru týskvøldið 18/2 kl. 18.

**Prøvataking:** Við Seabird CTD-ini tóku vit 47 støðir og salt á teimum flestu støðunum. WP2-glúp á 27 støðum.
Á støðunum R8, V6, N4, N5, N14 vóru prøvar tiknir av tøðsøltum.
Á støðunum R8,V6, N5, N14 vóru prøvar tiknir til $CO_2$-mátingar.
Á støðunum N7 og V6 vóru prøvar tiknir til goymslu.
Á øllum støðum á skurði K vóru tiknir prøvar av tøðsøltum og plantuæti.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Saltprøvarnir verða analyseraðir í vár.

**Viðmerkingar:** Vit høvdu vánaligt veður á, so at siga, øllum túrinum.
MIK-glúpurin var ikki brúktur, vegna veður.
Av tí at veðrið ikki var til vildar, var eingin hitamátari avlisin.

20-02-2020

Regin Kristiansen

vend




Kósir og støðir á túri 2002